# fjarðar kirkju 1950

kring krubbuna í Bethlehem í einum skirvisligum fjósi, men ljósið frá krubbuni var nógv bjartari enn ljósið í Getsemane í myndini hjá Eckesberg. Jesus lá og brosaði upp í andlitið á Elsu í Húsi, Magninu, Dunga Oluffu, Ellu á Breyt, Henriettu og Fiu við Stein. Merkiligt, at Jesuspápi eisini skuldi vera góður við gamlar gentur, sum vóru grenjutar og formanaðu okkum børnum við orðum úr Gamla Testamenti. Nei, tær skuldu heldur verið í Getsemane, enn at sitið her jólakvøld og verið aftan fyri greinarnar og trøini í hesari lund, so eingin sá tær. Sovið saman við lærusveinunum og kanska kóka teimum kaffi og givið teimum nýbakað skapilsi. Tað høvdu lærusveinarnir verið sera glaðir fyri.

Patriarkurin Heini í Stovuni – Stóra Skegg, sat sum ein profetur og boygdi høvur. Sat bara stillur. Hann var Jesuspápi góður við. Hann líktist Jesaja profeti. Hann livdi ímillum rúnurnar í hesi halgu bók og dugdi at skrifta úr henni meira enn nakar annar. Hann var so blíður og sá so mildur út. Hann fór at leiða allar tær gomlu grenjutu genturnar til krubbuna og biðja Jesuspápa vera góður við tær. Har kom hann gangandi eftir bitunum við teimum hond í hond, meðan Jesus í Getsemane rætti høgra arm út ímóti teimum. – Bara tær ikki detta av bitunum. Nei, Stóra Skegg hevði so sítt skegg, at tær kundu halda sær í skeggstrýggjum hansara, so tær ikki brustu í gólvið. Jesus bað tær bara koma og vaka við sær í Getsemane, men tað tímdu tær ikki – Heini vildi heldur leiða tær at krubbuni, sum var skamt við ta innastu ljósakrúnuna, beint framman fyri altartalvuni.

Ljósspælið í andlitunum bar ikki brá av tí ljóspæli, sum var í andlitinum á Jesus í Getsemane. Rukkurnar í andlitunum á teimum gomlu gentunum dandaðu sum vallingar í mánalýsi undir Rókum og Kalsoynni. Jesuspápi hevði onga rukku. Hann sá so sorgarfullur út jólakvøld ... í Getsemane. Hví smílist hann ikki? Hví brosar hann ikki móti ommu míni? Hon var Maria moy í Oyndarfirði. Bannaði ikki - var bara við tí góða orðinum. Formanaði ongan. Hon var so mild sum einglarnir á markini. Fía við Stein sat í tí ljósabrúna sjallinum og njóðraði teir donsku jólasálmarnar í einum fløktum duri, sum eg ikki skilti. Hon vildi treyðugt fara upp á bitarnar. Hon var so ser. Stóra Skegg var sterkur og syfti hana upp á bitarnar og fekk hana eisini við til krubbuna undir tí innasta ljósastakanum. Hon hevði tænt í Edenburgh undir Fyrra Heimsbardaga, og drongur hennara var fallin í krígnum í Frankaríki. Hon var komin aftur undir Róvlstein at vera og var so innisæl, at ikki sigst frá tí.

Andreas á Flótti legði lestrarfjølina upp á pláss, tók lestrarbókina fram og fór at lesa jólaboðskapin til jólakvøld.



Hann var sum ein himmalsk ond úr jólaboðskapinum. Brillurnar livdu á nøsini, hvørja ferð hann nevndi krubbuna. Tær gomlu genturnar sótu beint omanvert deknin og sveiggjaðu við beinunum. Tær vóru so glaðar og skemtaðu sína millum. Stovuheini hevði at teimum og bað tær sita stillar og ikki órógva lesturin. Tær so gjørdu og sótu og hildu hendur saman oman fyri Andreas tætt við krubbuna, har Jesusbarnið lá og durvaði, men Jesus í Getsemane lá á knæ og rætti hondina út. Vildi hann hava Heina í Stovuni til sín, ella vildi hann bara nerta við skallan á Andreasi? Hvar vóru lærusveinarnir hjá Jesusi, tímdu teir ikki at vera jólakvøld í Oyndarfjarðar kirkju? Teir skuldu skammast at standa og lúra aftan fyri greinarnar í Getsemanie. Spæla teir krógva og blunda? Tað ger eingin jólakvøld. Eingin hevur hoyrt slíkt.

Jósef og Maria sótu við krubbuna og tjúklaðu um tann nýføðda heimssonin. Runið í sjónum og alduskvatlið í Krabbhyli á fløðandi sjógvi fekk heimssonin at sova trygt. Mánin tepraði um fjallagreinirnar á Kalsoynni, og ein rípa av ljósi lá og rembdi sær úti í Djúpinum. Mánin var enn ikki komin undan í Getsemani, men í Bethlehem stóð ein bjørt stjørna og stavaði niður yvir krubbuna í Oyndarfjarðar kirkju undir tí innastu ljósakrúnuni. Stovuheini vildi hava øll í kirkjuni upp á bitarnar, áðrenn Andreas fór at lesa lesturin til jólakvøld. Omma – Lena í Ansastovu, var ikki so løtt upp á fót. Hon vildi treyðugt fara og somuleiðis abbi, men tá ið tey sóu Elina í Hvanngarðinum, Niklas og Siggu í Heiriksstovu og Heina í Móritsarstovu fara upp eftir einum gyltum stiga, lættu tey sær á og fóru eisini upp á bitarnar.

Hesi fólk, sum dagliga gingu og tøtlaðu hvørt um annað oman eftir og niðan eftir Sjóvartúni, brosaðu. Nú vóru tey á veg til krubbuna. Menninir hugdu út ígjøgnum gluggarnar á vegginum oman móti sjóvarmálanum og smáprátaðu um veður og vind. Allir vóru samdir um, at veðrið fór at halda sær um høgtíðina. Djúpini tóku nógv av mánalýsinum til sín. Tann myrki, stálgrái liturin í hesum djúpa vatni var eins myrkur sum myrkrið í altartalvuni av Jesusi í Getsemane. Hulisliga myrkrið millum greinar og træ tóku glæmuna av mánalýsinum uppi í vinstra horni í myndini til sín eins og Djúpini goymdu at tí bleika, erpna mánalýsinum, sum dansaði á eini útoyggj jólakvøld. Bjartast var ljósið yvir krubbuni. Tað var í eygunum á tí nýfødda og ein gloria var um høvdið. Hetta ljósið var eitt heilt annað ljós, enn tað, sum spjálkaði sær í Djúpinum og eisini øðrvísi enn ljósið í Getsemane. Tað líktist nógv tí ljósinum, sum bylgdist Frammi í Skarði eitt summarkvøld á hásumri í sólsetri, tá ið sólin skrivaði eitt stórt V á Rustina, men hetta ljósið í krubbuni og Betlehemsstjørnan í ljósakrúnuni var av himmalskum uppruna og nógv skarari.

Nú vóru øll fólk, sum vóru í kirkjuni, komin upp á bitarnar og summi vóru farin heilt upp í tróðrið. Nú sóust lívsroyndirnar skyggja í ljósrípum á andlitsbrøgdunum á oyndfirðingum jólakvøld. Barnið í krubbuni brosaði, og fólk undraðust yvir henda himmalska heimssonin, sum lá undir eini ljósakrúnu jólakvøld í kirkjuni í Sjóvartúni. Lívsundrið var í ljósinum Frammi í Skarði, í mánalýsinum á Kalsoynni og í fáliga ljósinum í Getsemane.

Jesus í Getsemane var so hugtungur. Hví fóru lærusveinarnir ikki at troysta hann ella tær gomlu genturnar, sum sótu kring krubbuna? Tær kundu givið honum ein temunn við jólakøkum. Jesus í Gethsemane lætst ikki um vón. Hann var í svárari neyð. Hví kemur hann ikki fram at krubbuni?

Dunga Oluffa fór í sínum hvíta fyrriklæði og sínum halgaða hatti yvir at myndini av Jesusi í Getsemane. Fór tætt at Jesusi og hálsfevndi honum. Jesus græt. Hann var so hugtungur og sorgarfullur. – Oluffa troystaði hann. Turkaði tárini av kjálkunum við tí hvíta fyriklæðnum.- Mín kæri drongur, hví ert tú einsamallur hesa kvøldarløtu í hesum urtagarði? Hon rópti á lærusveinarnar og bað teir skamma seg, at teir ikki kundu troysta Jesus í Getsemane jólakvøld. Hetta helt hon vera úrsýnt og ómenniskjansligt. Hon fór inn ímillum greinarnar og fann lærusveinarnar sovandi. – Hvat billa tit tykkum inn! Liggja tit og snorksova jólakvøld í hesi viðarlund, nú himmalski heimssonurin er borin í heim! Ikki skuldu tit lagt í! Hvar er Pætur? Pætur! Pætur!

Pætur raknaði við og settist upp undir seg. Hann sær Dunga Oluffu koma í sínunm hvíta fyriklæði millum greinarnar í Getsemane í móti sær. - Á, hann komi til mín, er tað tú Oluffa? Hvat veit tær við í kvøld? Tú ert ikki ørindaleys, tá ið tú so snjøll